


MYND: ÁRNI JOENSEN

*Halla hevur altíð sungið nógv. Hon hevði barnakór í Miðvági, áðenn hon flutti til Danmarkar.*

Danmark var eitt teirra. Sjálv var Halla leiðari fyri einari sonevndari workshop, har hon skuldi undirvísa í sjónleiki. Afturat sær hevði hon ein starvsfelaga úr Eysturríki, og næmingarnir vóru 18 í tali. Einki var fyrireikað frammanundan, so her ráddi bara um at brúka hugflogið. Dagurin var skipaður við undirvísing millum klokkan níggju og eitt og aftur frá klokkan tvey til sjey um kvøldið. Í flokkinum vóru børn úr fleiri londum sum eitt nú Bretlandi, Ísrael og Russlandi, men tað var ikki lætta at samskifta við tey. Tey fægstu dugdu enskt, so hendurnar, fingrarnir vóru tey mest brúktu amboðini at samskifta við. Var tað ikki nóg mikið, bleiv teknikynstrið tikið í brúk.

Børnini lærdu ymisk spøl, og tað var lætt at vera lærari, tí børnini dugdu sera væl at spæla sjónleik. Tað var týðiligt, at londini høvdu sent síni bestu á festivalin. Tey vóru sera frí á pallinum, vóru motiverað til alt, og tað sást, at teimum dámdi at spæla sjónleik. Tað gjørdi tað so mikið lættari at vera lærari, og í fleiri førum tóku lærararnir eisini hugskot frá næmingunum við í leikirnar.

## Munurin hvarv í leikinum

Høvuðsmálið við festivalinum er, at børn úr ymsum londum við ymsum mentanum kunnu vera saman og spæla sjónleik saman. Tað var stuttligt at síggja, hvussu ymisk børnini vóru, men hvussu allur munur hvarv, tá tey vóru felags um at spæla sjónleik. Børnini høvdu eisini stóra ávirkan á tann leikin, sum bólkurin hjá Hallu framførdi á festivalinum, og hjá skeiðleiðarunum var tað sera stuttligt at síggja, hvussu stórt hugflog børn hava, tá tey sleppa at arbeiða.

**– Hvat lærdi tú av ferðini í Moskva?**

– Tað var fantastiskt at sleppa at síggja, hvussu ein kann arbeiða við sjónleiki. Slagorðið á festivalinum var "No limits", og festivalurin vísti eisini, at tað eru eingi mørk. Eisini lærdi eg, hvussu nógv ein kann fáa burtur úr børnum, uttan at nøkur ætlan er løgd frammanundan. Sjálvandi var tað eisini stuttligt og áhugavert at møta fólki úr øðrum londum og øðrum mentanum.

**– Hvat við Russlandi sjálvum?**

– Tað er eitt heilt ørvísið land, enn vit eru von við her. Har er rætuliga grátt og myrkt. Eitt trist land, haldi eg. Og eitt skitið land. Men náttúran er sera vøkur. Har var sera strangt. Vit sluppu ikki út úr festivaløkinum. Húsini, sum vit búðu í, vóru so vánalig, at her hjá okkum høvdu tey als ikki verið góðkend hjá fólki at vera í. Nú búðu vit 40 kilometrar uttan fyri Moskva, men tað var sum at koma í ein annan heim at koma inn í sjálvan býin, tí har var alt sum her vestanfyri.

Sjónleikafestivalur verður ætlandi aftur um tvey ár. Tað er ikki vist, at Danmark verður umboðað tá, og tí er tað heldur ikki vist, at Halla verður við tá. Men hon ivast ikki í, at hon hevði tikið av, bleiv hon spurd.

## Eisini leikstjóri

Tað var í Esbjerg, at Halla byrjaði sítt sjónleikaravirksemi fyri átta árum síðani. Tað var á Esbjerg Børne- og Ungdomsteater, og har hevur hon verið virkin síðani. Hon hevur havt døturnar Mariu og Barbaru við sær, og tær hava verið á palli har fleiri ferðir. Fyri nøkrum árum síðani fingu Halla og ein onnur mamma hugskotið at royna seg sum leikstjórar. Tær hildu, at tað vóru ov fáir leikir fyri smá børn, so tær fiongu ein høvund at skriva eitt leikrit, so tær so settu upp, og sum eydnaðist sera væl. Síðani hevur Halla sett ein leik upp á hvørjum ári. Í ár arbeiðir hon við tveimum leikum, einum fyri smábørn og einum fyri størri børn. Halla dylur ikki fyri, at henni dámar at gera sjónleik við børnum:

– Tað er sera stuttligt. Í Esbjerg Børne- og Ungdomsteater hava vit tað so, at tað er pláss fyri øllum børnum. Vit hava einki limagjald ella annað gjald, so tað kostar einki at vera við. Tað ger eisini, at nógv foreldur, sum ikki hava ráð til at senda børnini til ymiskt dýrt virksemi, velja at senda tey til okkara. Tí eru børnini sera ymisk, men júst tað ger tað so spennandi at arbeiða við teimum.

– Sjónleikur gevur børnunum styrki ígjøgnum lívið, sigur Halla.

## Spældi Daimi

Í heyst spældu Halla og døturnar við í einum leiki, sum skuldi lýsa søguna hjá Esbjerg tey seinastu 100 árini. Her fall tað Hallu í lut at spæla leiklutin sum tann kenda songkvinnan Daimi, sum er ættað úr Esbjerg.

**– Nú líkist tú ikki Daimi, men hvussu var tað at spæla hendan leiklutin?**

– Nei, vit líkjast ikki, men tað var stuttligt. Nú hevði eg hugt eitt sindur eftir henni áðrenn og hevði lagt til merkis, at hon stendur still, meðan hon syngur. Tað var eitt sindur ringt at venja seg við. Men nú fekk eg eisini ein leiklut sum ein bosnisk kona, og tað var í veruleikanum lættari, og áhoyrararnir flentu óført, tá eg tosaði danskt við eitt sindur av gøtudonskum. So kanska ljóðar tað líka at hoyra ein føroying tosa gøtudanskt sum at hoyra ein úr Bosnia royna at tosa danskt.

Tað sæst á andlitinum, at Hallu dámar at tosa um sjónleik, og hon ivast heldur ikki í, at hon fer at halda fram sum sjónleikari.

– Ja, tað rokni eg heilt vist við. Eg havi onkuntíð hugsað um at læra okkurt víðari innan fyri drama, men tað verður so ikki nú. Tí tað er stuttligt at spæla sjónleik og at síggja, hvussu leikurin kann hjálpa fólki. Í mínum arbeiði havi eg eisini lært, at drama er eitt sera gott amboð til at lýsa kenslurnar hjá fólki við sinnistrupulleikum við. Tað er stuttligt og mennandi - eisini fyri meg.